

*Føroyski skiparin umborð á vaktarskipinum Tórsvík hjá Thor í Hósvík, varð í morgun illa stungin við knívi. – Støðan er undir kontroll, sigur reiðarin*

# Skiparin á Tórsvík stungin

**À bátinum Tórsvík, hjá reiðarínum Thor í Hósvík, varð føroyski skiparin í morgun stungin við knívi. Hann varð alt fyri eitt fluttur á sjúkrahús, og støðan er nú »undir kontroll«, sum reiðarin málber seg**

*eydna@sosialurin.fo*

Tórsvík er ein av vaktarbátunum hjá hjá Thor í Hósvík, og hann hevur seinastu tíðina havt vaktarhald á leiðini uttanfyri Helgeland og Kristiansund í Norra, har eitt annað skip skjýtur seismikk.

Manningin umborð á Tórsvík er ein blandingur av føroyingum og norðmonnum, og tað var ein av manningini, sum stakk føroyska skiparan. Reiðarin á Thor, Hans Andreas Joensen, vil ikki úttala seg um, hvørt tað var ein føroyingur ella ein norðmaður, sum stakk skiparan.

Enn er ógreitt, júst hvat tað var sum hendi umborð á Tórsvík í morgun, men skiparin varð illa stungin, og varð nakað eftir kl 8 í morgun fluttur við bjargingartyrlu á St. Olavs hospital í Trondheim.

Hans Andreas Joensen sigur seg hava frætt úr Norra, at støðan hjá manninum er «undir kontroll«, sum hann málber seg.

Norska blaðið VG veit tó at siga, at skiparin, sum er í 60'unum, hevur fingið álvarsaman skaða. Hann hevur fingið djúp knívssting í bringuna og magan. Blaðið skrivaði tó tíðliga í morgun, at skiparin var við vit.

## Politifrágreiðing

Hans Andreas Joensen sigur, at teir í løtuni bíða eftir politifrágreiðingini frá málinum.

– Tað verður sjálvandi eisini skrivað ein sjófrágreiðing, men í fyrstu atløgu bíða vit eftir politifrágreiðingini, fyri at finna útav, júst hvat tað var sum hendi í morgun, sigur reiðarin.

Hann leggur afturat, at tá orsøkin er funnin, fer Thor at taka stig til fyribyrgjandi tiltøk, sum skulu tryggja, at slíkt ikki kann endurtaka seg umborð á Thor skipum.

– Eg veit lítið og einki enn, men so skjótt, sum politifrágreiðingin er komin, senda vit tíðindaskriv út til miðlarnar, soleiðis, at misskiljingar ikki taka seg upp, sigur hann.

Spurdur, um gerningsmaðurin var drukkin, svarar Hans Andreas Joensen, at tað var hann ikki.

– Tað er bannað at drekka umborð á okkara skipum, staðfestir hann.

Maðurin, ið stakk, er við báti førdur inn til Kristiansund, men tað er enn óvíst nær báturin kemur til lands.

Tórsvík skal eisini til bryggju í Norra, inntil greiða er fingin á málinum.


## 6-MANNAFAR TIL SØLU!



**Báturin er úr glastrevja og er bygdur í 1984**
**Motorurin: Solé diesel 26 hk**
**Hevur: ekkolodd og VHF**
**Báturin liggur á Argjum**

**– Áhugaði kunnu ringja á tlf 59 45 57 –**





# KT-fólk til Atlantic Airways

Vit sóknast eftir einum kt-fólki við innliti og yvirliti. Høvuðsuppgávurnar fevna um at menna skipanir, at standa fyri netumsiting og at veita brúkarum hjálp.

Talan er um nógvar ymiskar skipanir við fleiri ymiskum uppgávum, og tí krevst breiður og neyvur kunnleiki til tólbúnað, net og forrit. Talan er um einar 60 brúkarar.

Tú hevur viðkomandi útbúgving ella góðar royndir, ið fevna um forritan, datugrunnar og netumsiting. Harafturat leggja vit dent á, at tú dugir at leggja títt arbeiði skilagott til rættis og hevur góð samstarsevni.

Tú ert røkin, arbeiðir sjálvstøðugt og ert til reiðar at taka eina hond í, tá ið á stendur. Vit kunnu bjóða eitt áhugavert starv við stórum og fjølbroytt- um avbjóðingum. Arbeiðsumhvørvið er sera gott, og møguleikarnir at menna seg bæði fakliga og persónliga eru góðir.

Starvið verður sett skjótast til ber eftir sáttmála við Atlantic Airways. Umsókn merkt »kt-fólk« kann sendast til Atlantic Airways, FO-380 Sørvági, og skal vera okkum í hendi seinast 11. juli kl. 12.00.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

ATLANTIC AIRWAYS

www.flyfaroe.com